**9.a flokkur**
**Miðvágs- Sandavágs skúli**

Løgtingið

**Ungdómstingmál nr. 9/2012: Uppskot til samtyktar um fleiri undirvísingartímar í ítrótti**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at kanna møguleikan at hækka talið av undirvísingartímum í ítrótti í fólkaskúlanum.

**Viðmerkingar:**
Skúlavikan er í dag 5 dagar, og bara tveir tímar verða brúktir til ítrótt. Okkara uppskot er at gera tað soleiðis, at tað verða 2 undirvísingartímar í ítrótti um dagin, 4 dagar um vikuna, tað vil siga íalt 8 tímar um vikuna. Undirvísingin í ítrótti skal vera breið, soleiðis at næmingarnir fáa roynt ymsar ítróttagreinar, so sum fimleik, fótbólt, hondbólt, flogbólt, svimjing, styrkivenjing og frælsan ítrótt, fyri at nevna nakrar. Úrslitið er, at næmingarnir blíva nógv frískari av meira ítrótti og koma í betri form.

Miðast skal eftir at hava tímarnar seint á degi, tí næmingarnir blíva sløvir av at sita í einari skúlastovu allan dagin, og tí er tað gott at sleppa at renna eina løtu.

Eisini skulu skiftirúmini gerast størri, og meira brúsur vera í skúlunum.

**Á Løgtingi, 6 februar 2012**

Eyðrið Andreasen Jóanis Albert Nielsen Mike Gaardlykke